## VIÐMERKINGAR

# Føroyar og útlendsk arbeiðsmegi



JÓGVAN VIÐ KELDU
Løgtingsmaður

**Tá vit síggja, hvussu Ísland, Noregi og Danmark ídag hugsa sær útlendingapolitikkin við eini virðisøking av væl útbúnum útlendingum, sær ikki politiskt væl út hjá okkum, skrivar Jógvan við Keldu**

Fyrst fari eg at takka Jaspuri Johannesen fyri áhugan og veruleikakendu viðgerðina av útlendingamálinum m.a. við greinini í Dimmalætting seinasta mikudag undir heitinum »Útlendingar, fjølmiðlar, hvat heldur tú sjálv/ur?«

Tey tvey árini eg sat sum landsstýrismaður í útlendingamálum, fingu hesi nógva umrøðu. Tað hevði sínar orsøkir, sum eg ikki skal koma nærri inn á í fyrstu syftu, hóast landsstýrismenninir báðir Bjarni Djurholm og Høgni Hoydal høvdu farið nógv ov lætt um hetta og gjørdi, at neyðugt var at taka málið veruliga upp.

**Tá løgmaður yvirreagerar**

Tað málið m.a. snýr seg um er, sum Jaspur Johannesen er inni á, nevniliga:

Ófaklærd fólk kunnu fáa arbeiði, um arbeiði er til tey. Tá einki arbeiði er, skulu hesi aftur av landinum. Hetta sigur lógin.

At løgmaður fyrst og fremst tosar um at geva eina jaliga viðferð, bert tí ein útlendingur er komin inn í landið, er ábyrgdarleyst.

Føroyar skulu hava ein skilagóðan útlendingapolitikk, sum umframt fyrst og fremst at verja okkara land, eisini eigur at tryggja teimum útlendingum, ið eru fastbúgvandi trygg og góð kor.

Nú visjón 2015 er sjósett, hevur tað stóran týdning, at ikki politikarar og løgmaður yvirreagera av onkrum uppringinum frá einum ella øðrum politikara ella onkrum uttanfyri "systemið" ella fjølmiðlafólki, tí tað snýr seg um ávís fólk, sum onkur kennir. – Hetta kemur ongantíð at fáa yvirorðnaðar avgerðir og kemur ikki at hóska visjón 2015 at politiskt renna undan hesum álvarsomu støðutakanum.

**Danskur útlendinga-politikkur ídag**

Nú ein dagin var grein í Jyllands-posten, har Danmark hevur ætlanir um í 2015 at gerast heimsins fremsta land, tá gransking umrøður við at fáa fatur á elituni. Samstundis sigur Dansk Handel & Service, at tað alt ov leingi hevur verið satsa uppá tey veiku innan útlendingapolitikkin.

**Fundurin við Rikke Hvilshøj**

Ein av orsøkunum til, at eg sum landsstýrismaður í oktobermánað í fjør tók fund við Rikke Hvilshøj, ráðharra í innflytaramálum, var fyri at fáa ein arbeiðsbólk settan, nevniliga fyri lógliga at stýra útlendinga-politikkinum í Føroyum á tann hátt, at fullnytta ófaklærdu arbeiðsmegina og at allar kunngerðir um bústaðarviðurskifti og onnur daglig viðurskifti vórðu fingin upp á pláss. – Hesin arbeiðsbólkur fór til arbeiðis beinanvegin og eitt úrslit av hesum fer at síggjast nú í vár.

**2015 – Mugu longur á leið**

Ikki minst er umráðandi, sum vit síggja bæði í Íslandi, Noregi og Danmark at vit fáa væl útbúnar útlendingar higar, sum kunnu geva okkum serfrøði, royndir, kapital og management. – Tá vit hyggja at hesum, sær ikki politiskt væl út hjá okkum.

Tað tykist, sum vit royna at skjóta ótrúliga høgt í ávísum førum eitt nú í visjón 2015, men siktið svarar ikki til, tí tað í løtuni liggur so serstakliga niðarlaga, við ad-hoc samtyktum, sum ikki geva loysnir.

Teori og praksis liggja langt hvørt frá øðrum. Visjónir líkjast alt oftari dreymum, har tað slepst undan at taka stórar og tungar avgerðir.

**Vit mugu longur á leið.**

So leingi, sum vit politiskt bert hugsa um at sløkkja ónøgdarsemi um ávísar útlendingar, sum ávísir politikarar og okkara fjølmiðlafólk elska, uttan at seta seg inn í málið, verða Føroyar "eitt u-land", tá útlendingapolitikki umrøður.

# Argja skúli –

## Frítt er Sandágerði frá at fara!



EYÐUN Á BORG

**Eg skal ikki koma inn á vind og sólargang har uppi, men vónandi verður tað ikki sum við Gomlurætt, tá onkur, eftir at arbeiðið var farið í gongd, segði: Eg visti ikki, at tað var so bratt har!, skrivar Eyðun á Borg millum annað um ætlaðu skúlabyggingina á Argjum**

Sum lærari í Argja skúla havi eg nakrar persónligar viðmerkingar um skúlabyggingarætlanir á Argjum.

Nú verður sagt, at vit fáa ein nýggjan skúla uppi undir hamrinum (oman fyri Hebron og barnagarðin).

Tað skuldi verið gott at fingið ein nýggjan skúla, men eg eri eitt sindur ivasamur og hugsi: Man søgan fara at endurtaka seg?

Í 1980-árunum høvdu vit næstan sett spakan í viðvíkjandi skúlavíðkanarætlanum her niðri á Billutrøð! Tekningarnar vóru fullfiggjaðar og snotiligar! Knappliga fekk onkur tað hugskotið, at best hevði kanska verið at bygt ein annan skúla longri uppi í bygdini!Hvat hendi? Alt byggimálið steðgaði! Jú, tíðirnar vóru serstakar. So gingu árini.

Í 2005 lógu aftur nýggjar, fínar tekningar á borðinum!Skúlin á Billutrøð skuldi víðkast/ nútíðargerast.

Hesa ferð varð spakin settur í! Í desembur 2005 kom ein borivognur og boraði nøkur hol á skúlans øki!

Eftir nýggjár komu so knappliga nýggj boð: Nýggjur skúli skal byggjast uppi undir hamrinum! Vónandi endurtekur søgan seg ikki!

Eg skal ikki koma inn á vind og sólargang har uppi, men vónandi verður tað ikki sum við Gomlurætt, tá onkur, eftir at arbeiðið var farið í gongd, segði: Eg visti ikki, at tað var so bratt har!

Kortini má eg siga, at neyvan verður pláss til skúlagarð/ spælipláss, tá ein breiður ringvegur er komin gjøgnum hatta økið oman fyri Hebron/ barnagarðin, og skúlin so skal kroystast niðan undir hamaran! Vónandi vita tit, hvat tit gera!

Annars haldi eg núverandi skúlaøki niðri við Sandágerði vera heimsins besta skúlaøki! Onkur hevur enntá framtíðarhugsjónir um Argja skúla sum "tann bláa skúlan niðri við sjóvarmálan", við neysti, bátadrátti og komandi sjósavni fáar metrar niðan fyri skúlan!?!

E.S! Onkur er eitt sindur í villareiði um, hvat nú fer at henda: Sleppa vit at velja, um vit vilja halda fram at starvast her niðri á Billutrøð, eftir at nýggi skúlin er komin?breiður ringvegur er komin gjøgnum hatta økið oman fyri Hebron/ barnagarðin, og skúlin so skal kroystast niðan undir hamaran! Vónandi vita tit, hvat tit gera!

Annars haldi eg núverandi skúlaøki niðri við Sandágerði vera heimsins besta skúlaøki! Onkur hevur enntá framtíðarhugsjónir um Argja skúla sum "tann bláa skúlan niðri við sjóvarmálan", við neysti, bátadrátti og komandi sjósavni fáar metrar niðan fyri skúlan!?!

E.S! Onkur er eitt sindur í villareiði um, hvat nú fer at henda: Sleppa vit at velja, um vit vilja halda fram at starvast her niðri á Billutrøð, eftir at nýggi skúlin er komin?

*eydun.a.borg@skulin.fo*

**Illur???**

**Sig tína meining í Sosialinum**






**Ársaðalfundurin**

**verður í Miðlahúsinum í Vágsbotni**

**í kvøld - týskvøld**

**7. mars kl 19.30**

**aftaná aðalfundin verður**

**Limafundur**

**við heitinum**

**Havnin í stórari menning - avbjóðingar og møguleikar**

**Heðin, Katrin og Elin leggja fyri**

**Møti fjølment**

**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag**